90 SEKUND

LAGT TIL RÆTTIS: Leo Poulsen

# BEINTA LØWE JACOBSEN

# Strævið at øll hava eina meining um tað eg geri



MYND: JENS KRISTIAN VANG

**BEINTA LÖWE JACOBSEN** ER **REDAKTIÓNSLEIÐARI** Í **ÚTVARPINUM** HJÁ KRINGVARPI FØROYA. **HENNI** DÁMAR **SERA** VÆL AT **LESA**, OG LESUR Í **LØTUNI TRÍGGJAR** BØKUR Í SENN. HENNI **DÁMDI** SO ILLA AT **HOYRA** SÍNI EGNU **RØDD** Í ÚTVARPINUM, AT HON **PLAGDI** AT **SLØKKJA**, OG SO MUNDI HON **EINAFERÐ** Í BEINLEIÐIS **TÍÐINDASENDING** SAGT **»HELVITI«** Í STAÐIN FYRI **»HELVTIN«**

**Um tú ikki búði í Føroyum, hvørjum landi vildi tú so búð í?**
Íslandi ella Norra

**Er tú til hundar ella kettur?**
Kettur. Tær eru sjálvstøðugar og gløggar.

## Kendist tað løgi at hoyra títt egna mál í útvarpinum at byrja við?
Ja, rættiliga løgið. Eg plagdi at sløkkja

**Hvat er tað besta við at gera útvarp?**
At tað er ein skjótur miðil og at vit tí ofta eru fyrst við tí nýggjasta. Og so dámar mær eisini væl at senda live og at lesa live.

**Hvat er tað ringasta?**
Tað kann vera strævið at øll hava eina meining um tað eg geri. Tá er gott at duga at leggja starvið burtur, tá ein kemur til hús.

## Hvat er títt størsta scoop?
Haldi ikki eg havi fingið mítt størsta scoop enn.

**Hvat er tað býttasta, tú hevur sagt fyri opnari mikrofon?**
Einaferð mundi eg bannast í einari tíðindasending. Eg mundi sagt »helviti«, tí orðið eg skuldi lesa var »helvtin«. Tað var fyrstu vikuna eg las beinleiðis, eg var í praktikk sum journalistnæmingur.

**Hvar er títt yndis ferðamál?**
Mær dámar væl í Berlin. Annars dámar mær væl á Syðradali á Kallsoynni.

## Metir tú teg sum góðan kokk?
Á toluligari leið.

**Hevur tú nakað frítíðarítriv?**
Eg lesi rættuliga nógv, og so eri eg so heppin at hava eitt arbeiði, ið eisini er mítt frítíðarítriv.

**Hvør bók liggur á náttborðinum?**
Tað liggja altíð fleiri bøkur á náttborðinum. Í løtuni lesi eg millum annað Hvorfor England sov, hjá John F. Kennedy. Eina bók um politiska lívið í Washington og eina bók um vald.

## Verður tú eisini at hoyra í útvarpinum um 10 ár?
Trupult at spáa um framtíðina